UTTAN ÚR HEIMI

### Oljuprísurin skal niður

Viðurskiftini í Miðeystri og Irak og ótrygg politisk viðurskifti aðrastaðni í heiminum gera, at oljuprísurin er ímillum 10 og 15 dollarar oman fyri tað, sum hann annars hevði verið.

Tað heldur formaðurin í OPEC, indonesiski oljumálaráðharrin Pumomo Yugiantoro. Á einari orkuráðstevnu í Sidney fyrradagin segði hann, at høvdu viðurskiftini í Miðeystri og Irak batnað, og høvdu ymisk politisk viðurskifti aðrastaðni komið í rættlag, hevði oljuprísurin farið niður á einar 30 dollarar fyri tunnuna. Men prísurin skal heldur ikki nógv niður um tað, tí sambært OPEC-formanninum mugu fleiri av OPEC-londunum fáa minst 25 dollarar fyri tunnuna, fyri at tey kunnu hava avlop á fíggjarlógini.

Mikudagin í næstu viku verður fundur í OPEC. Higartil hava fleiri av londunum sagt, at oljuprísurin eigur at liggja ímillum 22 og 28 dollarar, men nú halda tey, at prísurin eigur heldur at liggja ímillum 25 og 30 dollarar, skrivar Reuter.

### Neyðtaka doyvdar kvinnur

Í Bretlandi er tað vorðið so vanligt, at menn lata ymisk doyvandi evni í vín- ella ølglasið hjá kvinnunum, at nógvar kvinnur tora ikki á vertshús, skrivar blaðið The Guardian.

Tað er heldur ikki so løgið, tí sambært einari kanning, sum The Guardian og sjónvarpið Channel 4 hava gjørt, fáa umleið 30 bretskar kvinnur tílík doyvandi evni í vín- ella ølglasið hvørja viku. Tað eru menn, sum lata evnini í glasið, og tað verður gjørt, uttan at kvinnan varnast tað, og fleiri ferðir endar tað við, at maðurin seinni neyðtekur ta doyvdu kvinnuna. Men samkyndir menn eru eisini offur, skrivar The Guardian.

Í 1999 bleiv ein kendur bretskur plátuvendari funnin sekur í at hava latið doyvandi evni í gløsini hjá 13 kvinnum og at hava neyðtikið fýra teirrra. Hann fekk lívlanga fongsulsrevsing.

### Ímóti at víga samkynd

Í svenska ríkisdegnum eru politikararnir í ferð við at fyrireika eina reglugerð um rættindini hjá samkyndum at verða vígd innan kirkjugátt, men longu nú hava politikararnir fingið ein hóp av mótmælum.

Sambært Svenska Dagbladet hevur løgmálaráðið fingið umleið 40.000 mótmælisskriv teir báðar seinastu mánaðarnar. Í flestu førum er talan um brøv frá einstaklingum, men í øðrum førum hava fólk savnað undirskrivtir ímóti reglugerðini. Eitt av undangongufólkunum fyri reglugerðini, Tasso Stafilidis úr Vinstraflokkinum, sigur við Svenska Dagbladet, at minst eitt ørindi úr Bíbliuni er í hvørjum einasta brævi, sum løgmálaráðið hevur fingið.

Í næstu viku heldur svenska kirkjan ársfund. Á ársfundinum í fjør var spurningurin um viðurskiftini ímillum kirkjuna og tey samkyndu eitt av høvuðsevnunum, og roknað verður við, at soleiðis verður tað eisini í ár.

### DNA upp á mánan

Bretski vísindamaðurin Bernard Foing heldur, at tað hevði verið eitt skilagott hugskot at goymt DNA-royndir av øllum heimsins skapningum uppi á mánanum.

Talan er um eitt slag av einari nýmótans Nóa ørk. Vísindamaðurin, sum starvast hjá evropeiska rúmdargranskingarstovninum ESA, sigur seg stúra fyri, hvat kann henda, um alt lív á Jørðini verður lagt oyðið av einum kjarnorkukríggi ella av einum samanstoyti við ein stóran rúmdarstein. Sjálvur heldur hann, at ein tílíkt kríggj ella ein tílíkur samanstoytur hevði gjørt av við alt livandi á Jørðini, og tí heldur hann, at vit eiga at senda DNA-royndir av menniskjum, djórum og plantum upp á mánan, so tað kann goymast har.

Aðrir granskarar siga við BBC, at tað er als ikki trupult at fullføra ætlanina hjá Bernardi Foing, men teir siga, at tað er umráðandi at goyva DNA-royndirnar væl. Tað besta er at grava tær niður á mánanum, siga teir.

# USA missir tamarhaldið á iraksku býunum

**Irakskir uppreistrarmenn taka valdið í einum býi fyri og øðrum eftir. Amerikanararnir viðganga, at teir hava trupulleikar, og teir duga ikki at siga, nær teir kunnu taka valdið í býunum aftur**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Ein irakskur uppreistrarmaður á varðhaldi í Sadr City í Bagdad*

*Mynd: Reuters*

Samstundis sum talið á amerikonskum hermonnum, sum hava latið lív í Irak, er farið upp um 1.000, vinna irakskir uppreistrarmenn fótafesti í alt fleiri av teimum stóru býunum.

Í seinastuni hava uppreistrarmenninir tikið valdið í býunum Fallujah, Ramadi og Baquba, og fyrr í vikuni løgdu teir eisini Samarra undir seg. Felags fyri hesar býirnar er, at teir eru í tí sokallaða sunni-tríhyrninginum, har meginparturin av fólkinum eru sunnimuslimar. Tíðindastovurnar skriva, at fleiri av leiðarunum í hesum býunum eru fyribeindir, tí teir hava arbeitt saman við fyribilsstjórnini, sum sambært sunnumuslimunum er í lummanum hjá amerikanska hersetingar-valdinum.

Eitt av málunum við at beina fyri teimum, sum arbeiða hjá fyribilsstjórnini, er at ræða onnur frá at gera tað sama, skrivar Aftenposten. Fyri nøkrum døgum síðani beindu uppreistrarmenninir fyri Suleiman Marawi, sum var ovasti fyri tjóðarhirðini í Fallujah. Hann bleiv hálshøgdur, og tann høvuðleysi kroppurin bleiv almannakunngjørdur á sjónbandi.

Men fyribilsstjórnin og amerikanararnir møta eisini harðari mótstøðu í fleiri shiamuslimskum býum. Í Sadr City, sum er ein býarpartur í Bagdad, hevur Mehdi-herurin tikið valdið.

Amerikanskir hermenn hava roynt at taka valdið aftur, men til fánýtis. Støðan er tann sama í býunum Najaf og Karbala. Har hava amerikanararnir gjørt av at taka seg aftur.

### Ásanna trupulleikarnar

Amerikanska herleiðslan í Irak og verjumálaráðið í Washington viðganga, at støðan er versnað í seinastuni, og at hetta kann enda við, at tað ætlaða valið í januar kemur í vanda.

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, segði á einum tíðindafundi fyrr í vikuni, at irakska stjórnin má skilja, at yvirgangsmenn kunnu ikki hava valdið í pørtum av Irak. Tí hevur USA lagt dent á at venja irakskar hermenn og løgreglumenn, so teir kunnu taka sær av uppreistrarmonnunum, men sambært Richard B. Myers, verjuovasta eru tær iraksku deildirnar ikki førar fyri at loysa trupulleikarnar, og tað verða tær heldur ikki fyrr enn um ársskiftið, sigur hann við Washington Post.

Amerikanararnir halda, at teir iraksku uppreistrarmenninir nýta teir stóru býirnar sum miðstøðir fyri bumbuálopum á mál aðrastaðni í landinum, og at tær nógvu burturflytingarnar verða eisini fyrireikaðar har.

# Heimurin vil hava Kerry

**Í 30 av 35 londum vil meirilutin hava John Kerry at vinna forsetavalið ímóti George W. Bush**

VAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bara í Nigeria, Filipsoyggjunum og Pólandi hevur George W. Bush fleiri stuðlar enn John Kerry, og í India og Teilandi stendur á jøvnum.

Tað vísir ein kanning, sum GlobeScan hevur gjørt. Kanningin umfatar 35 lond, og hon vísir, at í meðal fær Kerry undirtøku frá 46 prosentum av teimum spurdu, meðan Bush fær 20 prosent í meðal.

Steven Kull á lærda háskúlanum í Maryland sigur við tíðindastovuna AFP, at sjálvt um Kerry ikki er so væl kendur sum Bush, hevði hann vunnið so ruddiliga, um heimurin skuldi velja amerikanska forsetan. Men tað eru amerikanararnir, sum velja forsetan´i USA, og har er Bush framman fyri Kerry.

AFP nevnir úrslitið av kanningini í Noregi, og tað vísir, at norðmenn eru ikki í iva um, hvønn teir vilja hava í Hvítu Húsini. 74 prosent siga seg taka undir við Kerry, og bara sjey prosent stuðla Bush.



Hjáveiðan hjá nótaskipunum:

# Bjørn tekur málið í fullum álvara

**– Eg taki málið um hjáveiði av upsa og toski hjá nótaskipunum í fullum álvara, og tí havi eg biðið Fiskiveiðieftirlitið og Fiskirannsóknarstovuna kannað hesi viðurskifti, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg taki málið um hjáveiði hjá nótaflotanum í fullum álvara. Tí havi eg biðið um, at málið verður kannað. Bara svartkjaftaveiðan undir Føroyum í fjør var eini 500.000 tons, og tað er skjótt, at hjáveiðinøgdirnar kunnu gerast stórar, hóast uppíblandingin í fyrstu atløgu ikki sær út av nógvum, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sigur, at á tingi hevur verið róð uppundir, at hann sum landsstýrismaður ikki skal taka málið um hjáveiði hjá nótaskipum í álvara. Somuleiðis hava menn líka sum roynt at fingið landsstýrismannin at siga, hvussu stórur hesin trupulleiki er.

– Jú, eg taki hetta málið í fullum álvara, og tí havi eg biðið Fiskiveiðieftirlitið og Fiskirannsóknarstovuna kannað hesi viðurskifti. At eg enn ikki kann siga, hvussu støðan er, kemst av, at kanningarnar ikki eru lidnar.

Bjørn Kalsø sigur, at enn hevur hann – sum hann sjálvur tekur til - ongar alarmerandi ábendingar fingið um stóra hjáveiði av eitt nú upsa, toski ella kongafiski.

– Fiskiveiðieftirlitið hevur í summar kannað veiðina hjá føroyskum og øðrum skipum, sum hava landað í Føroyum, men hesi hava fyri tað mesta fiskað í íslendskum sjógvi og altjóða sjógvi. Síðan kanningarnar byrjaðu, hevur lítil og eingin fiskiskapur verið í føroyskum sjógvi.

### Minni enn 1%

Bjørn sigur, at Fiskiveiðieftirlitið hevur staðfest, at ein ávís hjáveiða hevur verið av eitt nú upsa og kongafiski, men enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv talan er um.

– Nøgdirnar, sum nótaflotin førir til lands, eru stórar, og landingin gongur skjótt fyri seg. Tí hava vit onga haldgóða niðurstøðu fingið enn, og tí er í løtuni eisini ógjørligt at siga, hvussu nógv talan er um.

Í samrøðu við Sosialin í gjár, segði leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, at teir hava staðfest eina ávísa hjáveiði uppi í veiðini hjá nótaflotanum, men soleiðis, sum vit skiltu hann, hevur talan verið um hjáveiði, sum helst liggur niðanfyri tað eina prosentið.

– Men vit kunnu ikki koma við nakrari endaligari niðurstøðu enn, tí kanningarnar eru ikki lidnar, segði hann.

Í samrøðu við Sosialin, heldur Bjørn seg ikki hava skilt, at hjáveiðan hjá nótaskipunum hevur ligið omanfyri tað eina prosentið.

– Men fyri tann skuld verður hetta málið tikið í fullum álvara, tí bara svartkjaftaveiðan undir Føroyum í fjør var eini 500.000 tons, og tað er skjótt, at hjáveiðinøgdirnar kunnu gerast stórar, hóast uppíblandingin í fyrstu atløgu ikki sær út av nógvum.

Landsstýrismaðurin sigur, at ongar hjáveiðireglur eru galdandi fyri nótaskipini.

– Mær kunnugt, hevur hesin parturin av flotanum altíð fiskað rættiliga "reint", og tí hevur ivaleyst verið hildið, at neyðugt ikki hevur verið við hjáveiðireglum.

### Halda fram

Bjørn Kalsø sigur, at Fiskiveiðieftirlitið eisini fer at halda eyguni eftir hjáveiðini, tá ið fiskiskapurin hjá nótaskipunum væntandi tekur seg uppaftur í heyst.

– Tað hevur ljóðað, at íslendingar hava umhugsað at steingja leiðir, tí hjáveiðan hjá nótaskipunum á ávísum leiðum er vorðin ein trupulleiki.

Hann sigur, at hann sum landsstýrismaður fer at fylgja væl við kanningunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum og Fiskirannsóknarstovuni.

– Men fyrst noyðast vit at fáa staðfest, hvussu støðan er. Er hjáveiðan ein trupulleiki, fara vit sjálvsagt at taka hetta álvarsmál upp, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður.

# Hevði verið ringt við ongum upsa

**Í vikuni hava tríggir trolarar lagt veiðina upp á Sandi. – Lítil og eingin toskur er at fáa, og tí er minni arbeiði á Sandi, har saltfiskaframleiðslan er enn í Skopun, har fiskurin verður skorin til flak og frystur, sigur stjórin á Sandoy Seafood, Magnus Jespersen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Á Sandoy Seafood í Skopun er nógv fiskaarbeiði í hesum døgum, men minni er at gera á virkinum hjá sama felag á Sandi, tí eingin toskur kemur upp á land. Tríggir trolarar hava landað á Sandi í vikuni. Meginparturin av veiðini hjá skipunum er upsi*

Mánadagin komu partrolararnir, Columbus og Nornagestur, aftur av túri. Teir høvdu nógvan fisk, eini 300.000 pund tilsamans. Meginparturin av veiðini var upsi og nakað var av hýsu. Columbus landaði 150.000 pund á Sandi, og Nornagestur landaði umleið somu nøgd í Miðvági.

– Vit kundu keypt lastina hjá báðum bátunum, men hetta hevði verið ov nógvur fiskur at fingið inn í einum, tá ið eingin toskur er uppi í veiðini, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood. Upsin verður skorin í Skopun, og toskurin saltaður á Sandi. Tá ið at kalla øll veiðan er upsi, er eingin fiskur til saltingar á Sandi, og tey megna ikki at skera meira enn ta einu stóru lastina í Skopun í senn.

Nú minni toskur kemur upp á land, er eisini minni saltfiskaarbeiði á Sandi, har tey eisini hava saltað nakað av longu.

Magnus Jespersen sigur, at eingin marknaður er fyri saltaðum upsa í løtuni.

Í dag landa aftur tveir trolarar á Sandi, Grímur Kamban og Kalsevni, sum eru komnir í flotan fyri Research og Skansatanga. Hendan túrin hava teir eini 120.000 pund tilsamans. Meginparturin av veiðini er upsi, sum eisini verður skorin í Skopun.

### Eingin útróður

Lítil og eingin útróður hevur verið í Sandoynni í summar, og Magnus Jespersen heldur, at hetta árið sum heild man hava roynst sera vánaligt hjá útróðrarvinnuni.

– Fiskiskapurin á Norðhavinum royndist ikki nær til so væl, sum hann plagar, tá ið hann er góður, og í summar hava bátarnir lítið og einki fingið.

Hann vísir á, at útróðrarvinnan í Suðuroy eisini hevur havt eitt vánaligt ár í ár.

– Skip og bátar fáa ongan tosk, og hetta er galdandi um allan grunnin í løtuni.

Magnus Jespersen vísir á, at onkur søla av Føroyabanka hevur verið í vikuni, og her hevur heldur eingin toskur verið at tosað um.

– Tað hevði verið lítið fiskaarbeiði kring landið, um eingin upsi kom uppá land.

Prísirnir á upsa eru framvegis rættiliga lágir; teir liggja um 3,50 krónur fyri kilo – alt eftir støddini.

Stjórin á Sandoy Seafood sigur, at støddin á upsanum hevur verið betur í seinastuni, og hann heldur, at slagið, sum skipini hava fingið vestanfyri, hevur verið hampiliga gott.



*– Tað hevði verið lítið fiskaarbeiði kring landið, um eingin upsi kom uppá land, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood*

### Skerja hjáveiðina hjá lemmatrolarum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsstýrisfundi, 7. september, viðgjørdi landsstýrið eina kunngerð um hjáveiðireglur fyri fiskifør, sum ikki eru undir fiskidagaskipanini.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sigur, at hetta er ein reglulig kunngerð, sum verður lýst tvær ferðir um árið.

– Talan er um kunngerðina um hjáveiði av toski og hýsu hjá lemmatrolarum.

Hann sigur, at hesi skip hava havt eina loyvda hjáveiðikvotu, sum er 50 tons av toski og 50 tons av hýsu um hálvárið.

– Nýggja kunngerðin, sum kemur í gildi beinanvegin, skerjir hesa hjáveiðikvotu hjá lemmatrolarum við 4%, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður.